# Deildarstjóri til Mentamáladeildina

Mentamálaráðið
MENTAMÁLADEILDIN

Vit sóknast eftir einum dugnaligum og ágrýtnum deildarstjóra, sum vil stíla fyri hesum týdningarmikla og spennandi øki.

**Starvið:**
Í sambandi við at okkara deildarstjóri fer frá vegna aldur er eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í mentamáladeildini í Mentamálaráðnum.

Høvuðsuppgávurnar hjá mentamáladeildini eru m.a. at:
- Fyrisita hægru umsitingina av útbúgvingar-, granskingar- og mentanarstovnum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar, granskingar- og mentanarstovnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv millum skúlar og stovnar o.o.

Deildarstjórin er leiðari av mentamáladeildini, og hevur ábyrgd av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum og stovnum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður/mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv. Deildarstjórin er partur av leiðsluni í Mentamálaráðnum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava:
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja til at royna nýggjar leiðir, serliga nú starvsøkið stendur fyri stórum avbjóðingum
- Áhuga fyri avbjóðingum
- Góðar málførleikar, serliga í føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Vit bjóða:**
Mentamálaráðið mennist alsamt og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandasamstarv.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan. Mentamálaráðið arbeiðir við visjónum og er partur av visjón 2015.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður lønt í 37. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at verða eitt tænastumannastarv. Lønin er í løtuni kr. 40.972,46 um mánaðin, umframt 15% í eftirløn.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. september 2007 kl. 16.00.

Starvið verður sett skjótast tilber.
Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 555051.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Í Mentamáladeildini** eru Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli, gransking, Føroya Fornminnissavn, Biofar, Føroya Landsskjalasavn, Landsbókasavnið, bókasøvn, Kringvarp Føroya, kirkjumál, ítróttur og annað frítíðar- og mentanarligt virksemi. Í deildini eru 7 starvsfólk.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

HAVNAR BIO
kall Coca-Cola




**The Bourne Ultimatum**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 18.08 | kl. 20.30 | kl. 23.00 |
| Sunnudag | 19.08 | kl. 19.45 | kl. 22.15 |




**Min skøre familie Robinsons**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 17.00 |
| Leygardag | 18.08 | kl. 17.00 |
| Sunnudag | 19.08 | kl. 16.00 |




**Kollegiet**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 23.30 |
| Leygardag | 18.08 | kl. 23.30 |
| Sunnudag | 19.08 | kl. 22.45 |




**The Simpsons – The Movie**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 18.15 | kl. 21.15 |
| Leygardag | 18.08 | kl. 18.15 | kl. 21.15 |
| Sunnudag | 19.08 | kl. 17.30 | kl. 20.30 |




**Du almægtige, Evan**

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 17.08 | kl. 19.00 |
| Leygardag | 18.08 | kl. 19.00 |
| Sunnudag | 19.08 | kl. 18.15 |

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu
www.bio.fo • Telefon 31 19 56